



Jógvan Joensen hevur her gjørt eina tekning av sonevndum vrók-idnaði í Føroyum, sum byggir á háteknologi innan fiskiidnaðin.

Vit siggja, hvussu eitt samarbeiði kann fara fram millum fiskiidnaðin og elektronik- og mekanikidnaðin: At háteknologivitan fra hinum norðanlondunum hevur stóran týdning, og at útbugving av fólki hevur stóran týdning. Og at eitt slíkt samarbeiði kann føra til útflutning av sonevndum turn-key-projektum, sum kunnu verða eitt heilt líðugt flakavirki við trolarum og øðrum tilhoyri



Á hesi tekningin siggja vit, hvønn týdning tað hevur, at háteknologi verður brúkt innan fiskivinnuna og fiskiidnaðin. Ovast er søluliðið. Síðani fiskiidnaðurin og niðast fiskiflotin. Við nútímans teknologi stendur søluliðið í samband við flakavirkini, ið straks kunnu siga, hvat tey hava á goymslu. Flakavirkini standa so aftur í samband við skipini, ið siga, hvat tey hava inni osfr. Við framkomnari teknologi í øllum líðum ber til at tilrættaleggja veiðu, framleiðslu og sølu munandi betri



Aftana ráðstevnuni í november. Frá vinstru: Tormóður Dahl, Jógvan Joensen, Arnbjørn Durhuus. Aftast: Magnus Danielsen, Liggjas í Bø og Simun Pauli Konoy

flyta maskinlutir og háteknologi saman við teimum turn-key-projektum vit gera?

5. Og hvussu skulu vit brúka háteknologi innan fiskivinnuni fyri at góðska fiskin meira og sostatt fáa meira burturúr?

Góðska fiskin meira

Jógvan visir í hesum sambandi á, at føroyingar í dag góðska fiskin ikki meira enn 15—20%. Hetta talið kann økjast munandi til eitt nú 30—35%. Tá fingu øll nokk at gera, og vit fingu meiri pening fyri vørurnar. Og tað er júst her, at háteknologiin kemur inn í myndina: nevntliga fyri at vit kunna økja um góðskingina við teimum 10 ella 15%.

Viðari sigur Jógvan, ath er eiga vit m.a. at hava í huganum at pakka í minni eindir og í betri pakningar. Hetta gevur hægri pris og meiri arbeiði.

Sjálvur heldur hann, at føroyingar gera alt ov lítið við at reklamera sínar vørur. — Fari eg í ein stórhandil og royni at finna kvalitetsfisk, so siggi eg bert sjáldan slíkan fisk undir føroyskum merki. Hetta er spell, tí sum fiskivinnutjóð við fyrstafloks vørum, eiga Føroyar altíð at verða tengdar saman við kvalitetsfiski.

Føroyar — kvalitetsfiskur

— Tit eiga at gera Føroyar kent sum kvalitesfiskaland. Eins og Danmark í dag er kent í útheiminum fyri fyrsta floks elektronikframleiðslu og t.d. Sweits fyri sínar mekanikvørur, so eiga Føroyar at verða kendar sum landið, ið fremst av øllum selur tann besta fiskin.

Tormóður Dahl tekur nú orðið og visir á, at møguleikarnir eru stórir, um vit bert vilja. Hann nevnir her svartkjaftin, sum í dag nærum allur fer til mjøl. Bert ein lítil góðsking innan hetta fiskaslag kann hava stóran samfelagsligan týdning. Men fyri at fáa eina slíka góðsking er neyðugt at brúka háteknologi sigur Tormóður, og visir á, at vit mugu hava teknologiina inn í øll lið bæði í veiðuna, í flutningin, í viðgerðina og í goymsluna. Svartkjaftaurin er ein sera viðbrekin fiskur, so skulu vit fáa sum mest burtur úr, mugu vit hava eitt tætt samstarv millum háteknologifólk og fiskimenn o.o.

Iðnaðarstovan ger gott arbeiði

Nú tekur Jógvan aftur orðið og sigur, at hann hevur lagt til merkis, at Iðnaðarstovan arbeiðir við nógvum góðum hugskotum fyri at brovta gongdina í Føroyum til tað betra. — Tá vit hugsa um, hvussu nýggj iðnaðarstovan er, bert 10 ár á baki, og hvussu fá fólk arbeiða her, so ma eg siga, at tit longu eru komnir langt. Eg haldi tað eisini er uppá tíðina, at virksemi hjá Iðnaðarstovuni verður økt munandi, soleiðis at fólk flest kunnu fáa betri áli á iðnaðinum, tí tað er jú hann vit øll liva av.

Hvussu er so støðan hjá føroyska iðnaðinum í dag? Hyggja vit eftir tølunum fyri bruttofaktorúrtøkuna fyri iðnaðin, so er tað einki land í heiminum, sum kann vísa á so stóran vøkstur sum føroyskur iðnaður. Hann er meira enn tvífalddur uppá 10 ár.

Men trupulleikarnir eru nógvir. Við verandi orku hevur iðnaðurin ikki havt møguleika at gera analysur, sum eru nóg góðar at byggja framtíðina á t.d. fyri at byrja heilt nýggj projekt. Tað er sum er ikki møguleiki at kanna hesi projekt nóg væl, aðrenn byrjað verður við eini framleiðslu. Her er neyðugt at vita meira bæði um framleiðslu og marknað. Í løtuni eru sostatt nógv projekt, har størri marknaðarkanningar áttu at verið gjørdar, áðrenn gongd kom á.

Politikararnir lurtaðu ikki

Í hesum sambandinum legði Iðnaðarstovan longu í 1974 fram uppskot um at skipa eina marknaðar- og menningardeild. Men hetta voru politikararnir ikki hugaðir fyri. Tað var óneyðugt varð sagt.

— Hetta kemst av teirri grund, at politikararnir hava ikki skilt iðnaðin, teir hava bert hugsað um tosk, hýsu og upsa. Og so er havið fult av nógvum øðrum møguleikum, sigur Tormóður Dahl.

Í hesum viðfangi sigur Jógvan Joensen, at trupulleikin liggur júst í analysuni. Tað átti at verið gjørd ein langtíðarætlan fyri menning av iðnaði og fiskivinnu.

— Eg má tí enn einaferð undirstrika, at tað er rætt at fara í gongd við eitt teknologihús, ið kann verða miðsavnandi fyri einum positivum útviklingi.

Jógvan visir enn einaferð til Com-Data sum eitt gott dømi um ein rættan útvikling — Her er talan um eitt virki, sum longu eftir trimum árum hevur skapt 12 arbeiðsplass. Sum hevur ein umsetning uppá meira enn 10 mill. kr. og eitt yvirskot longu nú uppá 1—2 mill. kr. Hetta virkið er við til at fremja menningina av háteknologi við tað, at tað ger framkomna edv-útgerð til analysu av arbeiðsgongdini á einum flakavirki. Teir hava klarað at selt til øll virkini eina skipan, sum kann brúkast til at kanna, hvussu framleiðslan gongur. Hetta hevur sera stóran týdning fyri at kunna økja góðsku og úrdrátt.

Upplýsingar skjótt

Jógvan leggur aftrat, at oftani vita virkini ikki, hvussu í veruleikanum stendur til fyrr enn ov seint er. At tey nú beinanvegin kunnu siggja, hvat er framleitt, hvat er á goymslu osfr. hevur ómetaligan týdning. Nú kann søluliðið fáa boð um, hvat er á goymslu og taka avgerð um sølu út frá upplýsingunum.

Vit spurdu í hesum viðfangi Jógvan Joensen, um tað ikki er vandi fyri, at arbeiðsfólk verða misbrúkt, tá skermur og edv verður tikið í brúk á einum flakavirki. Til tað sigur hann:

— Eg haldi ikki, at fólk skulu vera so bangin fyri at fáa háteknologi inn á virkini, tí tað fáa tey øll ayttu og gleði av. Vit fáa øll betri vitan um, hvussu stendur til á økkara egna virki, og hetta hevur sjálvandi áhuga fyri øll, sum arbeiða á virkinum.

— Tað eru dømi um, at øll hava hildið, at tað gekk so væl, men so knappliga gongur tann skeiva vegin. Starvsfólkini geva leiðsluni skyldina. Her er eyðsæð, at høvdu øll kunna fylgt við gongdini alla tíðina, so hevði støðan kunnað verið ein heilt onnur.

Ábyrgd hjá leiðslu

Jógvan heldur eisini, at tað er ábyrgdin hjá leiðsluni á einum virki at upplýsa starvsfólkið um, hvussu stendur til. T.d. átti at verið ein upplýsandi fundur um hetta av og á. Tað fremur arbeiðshugg og arbeiðsgleði at vita, hvussu tað gongur á eins egna virki. Hann nevnir í hesum sambandi Danmark og Svøriki, har slíkt demokrati verður framt á arbeiðsplássunum, soleiðis at starvsfólkini alla tíðina vita, hvussu til stendur.

Hvat viðvíkur sjálvum søluliðnum heldur Jógvan, at tað er sera týðandi, at hetta lið er við í menningini av háteknologiini. — Tað er ómøguligt at fáa iðnað og fiskivinnu at samarbeiða, um ikki søluliðið er við og setur seg inn í teknologiina.

Uppá fyrispurning um Føroyar sum vinnutjóð hevur møguleika at verða kappingarfør á altjóða marknaðum í framtíðini og um vit ikki eru

Framhald á síðu 16